Bergur Berg

Fra: Theodor Eli Dam Olsen
Sendt: 13. marts 2023 12:45
Til: Bergur Berg; Símun Jacobsen; Maria Jørðdal Niclasen
Emne: SV: Lógaruppskot til ummælis – við SERSTAKLIGA stuttari freist

Til Almanna- og mentamálaráðið

Góði Bergur,

takk fyri teldubrævið.

Vegna stutta hoyringsfreist hava vit ikki havt møguleika at viðgjørt málið gjølla.

Vit hava ongar viðmerkingar.

Blíðar heilsanir

Vegna Prestafelag Føroya

Theodor Eli Dam Olsen, formaður

Fra: Bergur Berg <BergurB@ammr.fo>
Sendt: 8. marts 2023 15:17
Til: Theodor Eli Dam Olsen <theol@kirkjan.fo>; Símun Jacobsen <simunp@kirkjan.fo>
Emne: VS: Lógaruppskot til ummælis – við SERSTAKLIGA stuttari freist

Fra: Bergur Berg
Sendt: 8. marts 2023 13:52
Til: Biskupur (jf@folkakirkjan.fo) <jf@folkakirkjan.fo>; Dagbjørt Ólavsdóttir Hansen (doh@email.fo) <doh@email.fo>; Prestafelagsformaður (theol@hotmail.com) <theol@hotmail.com>
Emne: Lógaruppskot til ummælis – við SERSTAKLIGA stuttari freist

Almanna- og mentamálaráðið sendir við hesum Felagnum fyri Kirkjuráðslimir, Prestafelagnum og biskupi uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fólkakirkjuna í Føroyum (Heimild at býta upp embætisuppgávur millum próstar) til ummælis.

Uppskotið er heft við hesum teldubrævi.

Leggið til merkis, at ummælisfreistin er sera stutt, hon er tíverri einans til næsta mánadag á middegi.

Endamálið við uppskotinum er at útvega greiða heimild til, at landsstýrismaðurin eftir tilmæli Stiftsstjórnarinnar kann gera av, at tveir próstar skulu vera í próstadøminum, og eftir tilmæli biskups býta upp embætisuppgávurnar innihaldsliga teirra millum, og gera av, hvør teirra skal vera limur í próstadømisráðnum.

Uppskotið er gjørt eftir tilmæli frá Stiftsstjórnini, og er gjørt soleiðis, at tá broytingin er framd, fer at bera til at velja ímillum annaðhvørt eitt slíkt innihaldsligt uppbýti millum próstar, at venda aftur til bert at hava eitt próstaembæti (sum so verður dómpróstur) ella at býta upp í fleiri próstadømi.

Talan er sostatt um at seta ein valmøguleika afturat, meðan onki annars verður broytt í mun til møguleikarnar í galdandi skipan.

Ítøkiliga er ætlanin nú, at eitt komandi próstaembæti fyrst og fremst skal røkja viðurskifti viðvíkjandi starvsfólkaviðurskiftunum hjá sóknarprestunum, kirkjubókaføring og aðrari fyrisitingarligari embætisførslu hjá teimum, soleiðis at dómpróstur fær tíð til at leggja størri orku í arbeiðið viðvíkjandi fíggjarviðurskiftum fólkakirkjunnar og har afturat tengdum uppgávum; men uppskotið er orðað soleiðis, at innihaldsliga uppbýtið kann verða øðrvísi eina aðru ferð, um biskupur mælir landsstýrismanninum til tess.

Orsøkin til, at freistin er so stutt er, at um til skal bera at fáa tillagaðu skipanina at virka í ár, er neyðugt at broyta lógina í verandi tingsetu. Skal nakar møguleiki vera fyri tí, má uppskotið vera Løgtinginum í hendi longu nú týsdagin. – Annars kann tað í fyrsta lagi verða lagt fyri tingið á ólavsøku. Tá kann tað í fyrsta lagi koma í gildi einaferð í heyst, og tá fer tað ikki at kunna gera mun fyri arbeiðið í ár.

Tit eru væl komin at venda tykkum til undirritaða, um nakað er at spyrja um ella umrøða í hesum sambandi, eisini um kvøldið ella í vikuskiftinum.

Vit skulu sum sagt biðja um at fáa ummæli í seinasta lagi longu nú mánadagin 13. mars kl. 13:00.

Vinarliga / Kind regards

Bergur Berg
fulltrúi/senior principal

Almanna- mentamálaráðið/Ministry of Social Affairs and Culture
Eirargarður 2 • 100 Tórshavn • Faroe Islands
Tlf. +298 555043
bergurb@ummr.fo • **www.ammr.fo**